

Løturnar at taka sær av løttum vóru ikki mangar í finska herinum




*Dragsvik liggur sunnast í Finnlandi*

ógvuliga strangur yvirmaður spurdi Martin hvat tað var fyri ein "koda", sum stóð á telegraminum. Martin var yvirmanninum svar skyldigur. Hann hevði onga hóming av hvat "HBB3682BJ" merkti. "Men dagin eftir rann eitt ljós upp fyri mær. Og tá flenti eg væl og leingi".

### Rík uppliving

Tað var jarnharður disiplinur allan vegin. Seingin skuldi verða so væl reidd uppá millimeturin, at ein yvirmaður kundi sleppa eina finska peningamynt á hana. Hoppaði mynturin ikki upp aftur, so gjørdi yvirmaðurin ikki mætari, enn at skræða alt av seingini, og so mátti neyðars hermaðurin reiða alt upp av nýggjum. Líka inntil tað "sat". Sama var við tronga skápinum. Allir tríggir hermannabúnarnir – vetrarbúnin, summarbúnin og farloyvisbúnin skuldu inn í skápið saman við alskyns hernaðarútgerð. Um bara eitt smáting var av leið, so tók yvirmaðurin og háladi alt út úr skápinum. Og so máttu neyðardýrini aftur at stúva. Líka inn til yvirmaðurin var nøgdur eftir hernaðarligu forskriftunum. "Eg haldi teir brutu okkum niður sálarliga, fyri at kunna byggja okkum upp aftur eftir teirra tykki. Men tá vit skuldu heim aftur, so trappaðu teir niður uppá aktivitetirnar. Hetta var eisini við beráddum huga. Hetta fyri at nú skuldu vit venja okkum við sivila lívið aftur. Men ímóti endanum gjørdist ein rastleysur, um ein fekk ov nógvar frítímar." Martin er glaður fyri tíðina hann hevði í finska herinum. Hann forvann ikki meir, enn fyri ein sigarettpakka um dagin. Men hann kundi so koyra frítt við tokunum og bussleiðunum, meðan hann var í herinum. Sum hann sigur sjálvur: "Hevði eg livað umaftur. So hevði eg aftur farið í finska herin." Hann meinar, at allur føroyskur ungdómur burdi gjørt samfelags- ella hernaðartænastu av onkrum slagi. Tað er altíð gott og mennandi við disiplini.

### Serveraðu fyri Elisabeth Rehn

Finnlandssvenska Elisabeth Rehn, sum stillaði upp til finska forsetavalið í 1994, var finskur verjumálaráðharri, tá Martin var í herinum. Tann eina dagin kom hon á vitjan í Dragsvik-hernaðarleguni saman við hinum norðurlendsku verjumálaráðharrunum. Tá hendi tað óhepna fyri granatkastara-herdeildina, at teir raktu so skeivt, at teir skutu flaggstongina við norska flagginum í spønir. Deildin hjá Martini kom hinvegin til heiður og æru. Eingir sivilir tænarar vóru tøkir til galladøgurðan hjá Elisabeth Rehn fyri norðurlendsku starvsfeløgunum. Tað bleiv litið Martini og teimum upp í hendur at servera fyri tignarligu gestunum. Við millimeturs presisjón fingu hann og felagarnir alt bestikk, og allar borðiskar at liggja væl á borðinum. Og teir gjørdu tað framúr, tá teir serveraðu fyri tignarligu gestunum. Við stoltleika góvu yvirmennirnir hjá honum og øllum hinum í herdeildini ein eyka farloyvisdag. Hann er sera errin, tá hann greiðir frá hesum tilburðinum.

### Stoltur av finska upprunanum

Martin er stoltur av sínum finska uppruna. Tað eru bara hann og Rolf Björklund, sáli, sum eru uppvaksnir í Føroyum, og hava verið í finska herinum. Við serligum stoltleika minnist hann rørandi løtuna tá hann kom á land á hernaðaroynni, sum nevnist Russarö. Hendan oyggin liggur uttanfyri Hangö. Familjan hjá Martini býr í Hangö. Tað var júst á Russarö, at abbi hansara - sum eisini nevndist Böljer -bardist manniliga saman við øðrum ímóti sovjetiska yvirmaktini undir Vetrarkrígnum. Pápin hevur tríggjar hernaðar-medaljur, sum abbi Martin fekk undir Vetrarkrígnum. Og tað liggur í kortunum, at Göran, Thom og Martin skulu arva hvør sína medalju. Martin fylgir væl við í finskum viðurskiftum, og serliga finskum ítrótti, og finskum ítróttarfólkum. Hann er eisini stoltur av teimum finsku uppfinningunum, sum m.a. eru við til at ríka føroyska gerandisdagin. Wärtsilä, Jäspi, Kone, Nokia, Fiskars, Fazer og nógvar aðrar framleiðslur. Martin er eisini hugtikin av finska hernaðar-akfarinum, sum sjálvsagt nevnist "SISU-bilurin". Hann er tó vónbrotin av, at Kringvarpið ikki nevndi 90 ára tjóðardagin hjá Finnlandi við einum orði. Og at "3-2" ikki vil vísa brot úr landsdystum hjá Finnlandi, tá teir vísa brot hjá hinum norðurlondunum.

### Einki løgtingsval

Sum finskur ríkisborgari kann Martin ikki eins og hini systkini atkvøða til eitt løgtingsval. Hann sleppur kortini á kommunuval, og hevur annars øll rættindi, sum aðrir borgarar í Føroyum. Saman við konuni Gunnvá Svartá Wennerström, og synunum, sum eita Bogi (11), Gunnar (9) og Magni (7) hevur hann eitt hugnaligt heim í Jákup Nolseøes Gøtu, tætt við Vesturkirkjuna. Í 2005 vóru tey øll í Finnlandi, og Martin fegnast um, at synirnir dámdu væl at verða í Finnlandi. Tey fyrstu árini eftir hernaðartænastuna arbeiddi Martin á roykivirkinum, sum fyrst nevndist "Samfisk", men síðani broytti navn til "Farfish". Í 1997 fór Martin at starvast á Skipafelagnum, ella Faroe Ship, sum tað nevnist í dag. Í øllum tí Martin fæst við, er tað ein góður førningur, at hava verið í finska herinum. Hann eigur lut í einum finskum "Sisu", sum vit ikki ikki-finnar einki kenna til.

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*




*Hernaðarbilurin í Finnlandi eitur eftir finska máttinum; SISU*